UTTAN ÚR HEIMI

## Ætlan um stóra atsókn avdúkað

**36 kilo av spreingievninum TNT skuldu nýtast til fleiri yvirgangsatsóknir í Manila, men løgreglan avdúkaði ætlanina.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

- Yvirgangsmenninir ætlaðu at søkja at stórhandlum og jarnbreytastøðum í høvuðsstaðnum, segði forsetin í Filipsoyggjunum, Gloria Arroyo, við BBC í gjár. Hon legði afturat, at ein tílík atsókn hevði uttan iva kravt líka nógv mannalív sum atsóknin í Madrid 11. mars.

Løgreglan hevur tikið fýra menn í sambandi við avdúkingina, og hildið verður, at teir hava samband við tann muslimska yvirgangsfelagsskapin Abu Sayaf. Hesin felagsskapurin stríðist fyri sjálvsstýri har suðuri í Filipsoyggjunum. Hann er best kendur fyri sínar nógvu burturflytingar, men amerikanarnir vilja vera við, at felagsskapurin hevur tilknýti til al-Qaeda.

Eygleiðarar í Manila hefta seg við, at tíðindini um tær avdúkaðu ætlaninar koma júst nú. Forsetaval verður í Filipsoyggjunum um ein góðan mánað, og tá ætlar Gloria Arroyo at verða afturvald.

# Nú stendur á jøvnum millum Kerry og Bush





**Nýggjar meiningakanningar vísa, at tað stendur at kalla á jøvnum millum tey bæði forsetavalevnini í USA**

VALSTRÍÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hoyringin í amerikanska Senatinum av tí, sum hendi upp undir 11. september í 2001, hevur elvt til atfinningar at George W. Bush, forseta og stjórnini, men hetta tykist ikki hava ávirkað undirtøku hansara stórvegis.

Ein meiningakanning, sum stovnurin Pew Research Center, hevur gjørt, og sum varð almannakunngjørd í gjár, vísti, at John Kerry hevði fingið 47 prosent av atkvøðunum og Bush 46 prosent, var forsetavalið nú. Í einari kanning fyri einum mánað síðani fekk Kerry 52 prosent og Bush 43.

Gallup almannakunngjørdi eisini eina kanning í USA Today gjár. Eftir henni hevði Bush fingið 51 prosent og Kerry 47.

Eygleiðarar í USA høvdu væntað, at hoyringin í Senatinum fór at ávirka undirtøkuna hjá Bush, og tað vísti ein kanning í tíðarritinum Newsweek eisini. Har søgdu 65 prosent, at tey hildu ikki, at forsetin hevði gjørt nóg mikið fyri at forða atsóknini 11. september í 2001. Eina viku frammanundan høvdu 57 prosent ta áskoðanina.

Sambært Gallup-kanningini í gjár halda 54 prosent av amerikanarunum, at stjórnin hjá Bush kundi havt gjørt meiri fyri at forða atsóknunum at World Trade Center og Pentagon.

## Fangar avrættaðir

**Tveir pakistanskir tænastumenn, sum sótu fangar hjá Taliban- og al-Qaeda-viðhaldsmonnum á markinum ímillum Pakistan og Afghanistan, eru avrættaðir**

Pakistansku myndugleikarnir siga, at teir báðir menninir vórðu tiknir til fanga saman við tólv øðrum pakistanum í síðstu viku. Tólv av monnunum vórðu latnir leysir leygardagin, og hinir báðir eru síðani funnir aftur deyðir. Teir vóru avrættaðir, siga pakistansku myndugleikarnir.

Fleiri túsund pakistanskir hermenn hava seinastu vikurnar leitað eftir limum í Taliban og al-Qaeda á leiðunum við afghanska markið. Bardagarnir hava kravt 120 mannalív, og 166 fólk eru tikin.

Høvuðsmálið við átakinum var at finna leiðaran í al-Qaeda, Osama bin Laden, men hann var ikki at finna. Fyri nøkrum døgum síðani vildu pakistanar vera við, at teir høvdu tikið mannin, sum skal hava verið fregnartænastuleiðari hjá al-Qaeda, men í gjár varð fráboðað, at hann er ikki tikin kortini. Talan var um ein annan mann.

# Skeivt av Tony Blair at vitja Gadafi

**Fyrrverandi norski uttanríkisráðharrin, Thorbjørn Jagland, heldur, at tað var skeivt av Tony Blair at vitja libyska leiðaran.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Thorbjørn Jagland, sum nú er formaður í uttanríkisnevndini hjá Stórtinginum, heldur lítið um ta søguligu vitjanina hjá bretska forsætisráðharranum í Libya í síðstu viku.

- Menn tosa um eitt demokratiskt Stórmiðeystur, og tað fyrsta, ein av teimum fremstu ger, er at vitja ein av einaræðisharrunum har. Mær kunnugt verður libyska fólkið ikki betur viðfarið nú enn fyrr, sigur Thorbjørn Jagland við Aftenposten. Hann heldur eisini, at tað var illa umhugsað av Blair at fara til Libya bara nakrar fáar dagar eftir, at ísraelsmenn avrættaðu Hamas-leiðaran Ahmed Yassin.

Thorbjørn Jagland vitjaði í síðstu viku palestinska forsetan, Yasser Arafat, og hann heldur, at politikkurin hjá ísraelsmonnum og Vesturheiminum at avbyrgja Arafat tænir ikki ætlanini um demokrati í Miðeystri.

- Tað fyrsta stigið til veruligt demokrati í Miðeystri er eitt palestinskt ríki, sum helst verður eitt meiri nútímans demokratiskt samfelag enn tey flestu av hinum londunum í økinum, sigur Thorbjørn Jagland.

ítróttur
Nr. 63 • mikudagur • 31. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Rúni Weihe noregsmeistari

**Havnarmaðurin Rúni Weihe, ið telist millum okkara fremstu flogbóltsleikarar, hevur í ár vunnið greipuna í norskum flogbólti við felagi sínum BK Tromsø**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Landsliðsleikarin í flogbólti, Rúni Weihe, hevur um vikuskiftið vunnið norska meistaraheitið í flogbólti við felagi sínum BK Tromsø*

*savnsmynd*

Leygardagin var seinna finalan um norska meistaraheitið í flogbólti hjá monnum leikt. Í Noreg verður spælt best av trimum dystum í finaluni, og dysturin leygardagin var næsti finaludysturin millum BK Tromsø við Rúna Weihe á liðnum og Dragsvoll. Fyrstu finaluna vunnu Rúni og liðfelagar hansara á útivølli 3-2 eftir ein sera spennandi dyst.

### Greiður sigur

Dysturin leygardagin í Tromsø gjørdist ongantíð eins spennandi og tann fyrra finalan, tí megin partin av dystinum hevði Tromsø greiða yvirvág. Bert í fyrsta settinum var veruligur spenningur í, men til endans vann Tromsø settið 27-25. Síðani gjørdist munurin á liðnum sjónligari, og tey bæði næstu settini vann Tromsø ávíkavist 25-17 og 25-20.

Í norskum fjølmiðlum stendur at lesa, at Tromsø var betra liðið, og serliga var tað álopsspælið hjá Tromsø, ið gjørdi munin.

Við sigrinum leygardagin hava Rúni Weihe og BK Tromsø tryggjað sær greipuna í norskum flogbólti í ár. BK Tromsø vann nevnliga fyri kortum eisini norsku steypafinaluna, tá ið teir í finaluni vunnu 3-2 á KVBK.

### Ungt men vinnandi felag

Felagið BK Tromsø hevur ikki so nógv ár á baki. Flogbólturin í Tromsø datt niðurfyri fyri nøkrum árum síðani, men fyri okkurt um tveimum árum síðani bleiv felagið endurreist undir navninum BK Tromsø, og ikki kann sigast annað, enn at tað hevur gingið framúr væl síðani tá. Hesi bæði árini hevur tað nevnliga eydnast BK Tromsø at vinna ikki færri enn trý gullheiðursmerkir og eitt silvurheiðursmerki.

BK Tromsø hevur í hesum kappingarárinum leikt 31 dystir, og teir hava vunnið 26 av hesum dystum. Bert tvær ferðir hava teir verið við undirlutan í norsku landskappingini, meðan teir tríggjar dystir taptu í europeisku kappingini.

Ikki kann sigast annað, enn at hetta kappingarárið hevur verið eitt rimmar ár hjá Rúna. At gerast greipuvinnari fyrsta árið, ið hann roynir seg í norskum flogbólti, er ikki hvørjum mani beskorið. Harafturat hevur tað eisini gingist rættuliga væl á landsliðnum, sum jú teimum flestu flogbóltsáhugaðu føroyingum kunnugt, vann EM-kvalifikatiónina, ið var leikt í Skotlandi stutt fyri jól. Í hesari kapping varð Rúni eisini kosin besti leikari í kappingini, umframt at hann eisini bleiv valdur sum besti smashari í kappingini.

Rúni Weihe hevur tó eisini verið nógv darvaður av einum skaða í rygginum í ár, men hetta hevur tó ikki forðað honum í at leikt fyri tað. Undan seinnu finaluni í vikuskiftinum hevði Rúni tikið pínustillandi heilivág í fleiri dagar, so at hann var førur fyri at leika í finaluni. Nú fær Rúni so frið til at fáa ryggin frískan aftur, áðrenn hann í summar aftur skal á vøllin við føroyska landsliðnum, sum skal royna at spæla seg víðari í EM-høpi. Sosialurin ynskir Rúna Weihe hjartaliga tillukku við greipuni!

# Ongar broytingar í uppstillingini

**Í farnu viku var freistin úti at skjóta upp valevnir til formanssessin og hinar nevndarsessirnar í fótbóltssambandinum, og har vóru ongi nýggj nøvn**

FSF-AÐALFUNDUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Rúni Heinesen var eitt skifti í uppskoti sum formansvalevni í FSF, men trekti seg. Tó bjoðar hann seg fram aftur sum nevndarlimur í Fótbóltssambandinum*

Sum vit skrivaðu í síðstu viku, eru tað tvey valevnir, ið bjóða seg fram til formanssessin í Fótbóltssambandi Føroya. Annar er Óli Holm í Vági, meðan hin er Christian Andreasen á Argjum. Báðir eru teir gamlir í garði í FSF, so óansæð hvør ið verður valdur, er tað eingin ivi um, at nýggi formaðurin í FSF hevur royndar innan øki.

### Fimm uppskot til nevndarsess

Til hinar nevndarsessirnar í FSF eru fimm valevnir skotin upp. Teir fimm (allir eru mannfólk) eru Per Hansen, Rúni Heinesen, Bjarki Mohr, Magnus á Stongum og Karl Vidtfeldt. Rúni Heinesen og Karl Vidtfeldt sita báðir í nevndini í FSF, men standa fyri vali í ár.

Framhaldandi aðalfundurin hjá FSF verður í hølunum hjá fótbóltssambandinum, og hann byrjar klokkan tíggju leygarmorgunin. Á skránni er val av nevndum og varalimum, umframt val av ríkisviðurkendum grannskoðara. Síðsta punkt á dagsskránni til fundin er ymiskt, og har hevur FSF eitt uppskot um broting í »kappingarreglunum fyri fótbólt«.

Uppskotið hjá FSF snýr seg um tað sonevnda flytingarvindeyga. T.v.s. nær leikarar kunnu skifta millum feløg. FSF skýtur upp, at tað millum kappingarárini bert er loyvt at skifta felag, frá tí at kappingarárið endar og okkurt um átta vikur fram. Í summarstegðinum skal verða loyvt spælarum at skifta felag eftir seinasta leikdag í fyrra hálvu og til við tveir dagar, áðrenn seinna hálva byrjar.